gult cyan magenta svart



## Byrja av nýggjum við sernámsfrøðini

**Bólkurin, sum hevur kannað sernámsfrøðisliga virksemið, mælir til at gera enda á verandi skipan og lata starvsfólkini søkja størv í eini nýggjari tvørfakligari skipan**

SERNÁMSFRØÐI
*Eyðun Klakstein*

Trímannabólkurin, sum hevur kannað sernámsfrøðisliga økið í Føroyum, er eirindaleysur ímóti verandi skipan og heldur bestu loysnina verða ein fullkomiliga nýggja skipan.

– Verandi starvsfólk eiga at fáa í boði at søkja størv í nýggjum bygnaði ella fara frá við tí tíðarbudnu eftirløn, ið tey annars eiga rætt til, sigur arbeiðsbólkurin í fyribilsáliti, sum er lagt á heimasíðuna hjá Mentamálastýrinum.

Arbeiðsbólkurin ætlar, at fólk skulu koma við viðmerkingum til álitið, áðrenn tað verður endaliga orðað og latið landsstýrismanninum við mentamálum.

### Betri tænasta

Arbeiðsbólkurin mælir til, at sernámsfrøðisliga økið verður bygt upp av eini greiningarstøð og fimm ymiskum fakeindum.

Greiningarstøðin skal tryggja, at børn og foreldur fáa ein góða byrjan í skipanini, og harafturat er samstarvið millum greiningarstøðina og tær fimm fakeindirnar týðandi partur av skipanini.

Arbeiðsbólkurin hevur í sínum fyribils áliti staðfest trupulleikar og manglar í verandi skipan, og tað eru serliga børnini og foreldrini, sum líða undir hesum trupulleikum.

– Á greiningarstøðini verður virksemið fjøltáttað og fakliga samanvovið, og neyðugt er at fara tvørtur um tey mørk, ið teir almennu fyrisitingarkarmarnir higartil hava sett sær, sigur arbeiðsbólkurin í fyribils álitinum.

### Taka hædd fyri barninum

Arbeiðsbólkurin greinar síðani neyvt, hvussu greiningarstøðin skal virka, og hvørjar uppgávurnar hjá teimum fimm fakeindunum verða.

– Nýggja skipanin skal taka hædd fyri tí einstaka brekinum og arbeitt verður við barninum tvørfakliga sum eini heild, sigur arbeiðsbólkurin um nýggju skipanina.

Álitið skal latast landsstýrismanninum í mentamálum, og arbeiðsbólkurin ætlar eftir 1. juni at leggja seinastu hond á álitið og síðani lata landsstýrismanninum álitið fyri summarferiuna.

## Bilstevna í Klaksvík

**Komandi vikuskiftið verða nýggjastu bilmerkini at síggja á stevnu í KÍ-høllini**

Komandi vikuskiftið verður bilstevna í KÍ-høllini í Klaksvík.

Bilstevnan í Klaksvík er vorðin afturvendandi táttur, og minst einaferð um árið verða norðoyingar bodnir at síggja nýggjastu bilmerkini.

Í ár verða seks bilasølur við á stevnuni, og tær eru Nordbil, Suzuki, Wenzel, Esmar Simonsen, Ivan Johansen og Johannes Berg.

Seinastu bilstevnurnar hava verið sera væl umtóktar, og nógv fólk hava vitjað í høllini.

Klaksvíkar Ítróttarfelag skipar fyri stevnuni, sum verður leygardagin 7 og sunnudagin 8. apríl. Báðar dagarnar er opið frá klokkan 16.00 til 20.00.

Kostnaðurin fyri vitjandi er 30 krónur, og børn sleppa bert inn saman við vaksnum.

**ek**

# Stríðast við at fáa avloysara

**Strandferðslan er nøgt við ferjuna Scania, men øll formlig krøv skulu verða uppfylt, áðrenn skipið kann leigast**



*Strandferðslan arbeiðir í løtuni við at leiga hesa ferjuna, Scania, til siglingina um Lorvíksfjørð*

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Strandfaraskip Landsins arbeiðir av øllum alvi við at finna avloysaraskip til Lorvíksfjarðaleiðini, meðan Dúgvan verður umvæld fyri motorskaða.

Tað fer at taka eina tríggjar vikur afturat at fáa Dúgvuna í sigling, og hesa tíðina er neyðugt við avloysaraskipi, fyri at farleiðirnar um Lorvíksfjørð og Vestmannasund skulu verða røktar nøktandi.

– Vit hava hugt eftir ferjuni Scania, og vit eru nøgd við hana. Ferjan er nóg stór, hon er góð til at fáa tunga ferðslu umborð og í land, og hon er í góðum standi, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

### Veit ikki nær

Játtanin til at leiga avloysaraskip – 2,5 milliónir krónur – er fingin til vega, og tað, sum nú er eftir, eru myndugleikakrøv av ymsum slagi.

– Øll formlig krøv við klassa og skipaeftiriliti skulu verða í lagi, áðrenn vit leiga nakað skip, og tað tekur tíð at fáa hetta uppá pláss, sigur Strandferðslustjórin, sum als ikki vil geva nakað boð uppá, nær Strandferðslan kann hava eitt avloysaraskip í landinum.

– Skal tað geva nakra meining at leiga eitt skip, so skal tað verða sum skjótast, sigur Reidar Nónfjall.

Tekniski stjórin á Strandferðsluni, Magnus Magnussen, er farin til Saaremaa fyri at verða við til at fáa viðurskiftini har upp á pláss. Formligu viðurskiftini skulu verða í lagi – bæði haðani ferjan fer, og her tað kemur.

### Næstan 30 ár

Scania er bygt í Aalborg í 1972, og í løtuni er tað eitt felag, sum kallast Saaremaa Shipping Co., sum eigur skipið.

Scania er 68,7 metrar long og 16,5 metrar breið. Skipið er 3474 BRT og kann taka 80 bilar. Tað siglir 14,5 knob og er í løtuni undir estlendskum flaggi. Áður hava Scandlines og SweFerry AB átt skipið.

Skipið er munandi størri enn Ternan, sum í løtuni siglir á Lorvíksfjarðaleiðini, og skipið er eisini størri enn Dúgvan, sum vanliga røkir siglingina.

Um Scania verður leigað, skal ferjan sigla millum Klaksvík og Fuglafjørð.

# Nógv arbeiði av páskaútflutningi

**Kósavirkið arbeiddi saltifisk døgnið runt í eina viku fyri at fáa fiskavøruna klára til páskaútflutningin**



*Saltfiskaarbeiðið á Kósavirkinum er støðugt, men undan páskum hevur verið eitt sindur meiri enn vanligt verið at gjørt á virkinum*

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Um páskirnar er saltfiskur ein góð søluvøru í Suðureuropa, og hetta hava føroysku framleiðararnir eisini merkt farnu vikurnar.

Kósavirkið í Klaksvík er eitt av virkjunum, sum framleiðir saltfisk, og fyri góðari viku síðani varð arbeitt í trískiftisvakt fyri at fáa saltfiskin kláran til stóra páskaútflutningin.

– Vit hava havt støðugt saltfiskaarbeiði alt árið, men nú undan páskunum hevur tað verið eitt sindur meiri enn vanligt, sigur Adrian Dalsá, sum er stjóri á Kósini.

– Vit arbeiddu í trimum vaktum í eina viku, og tað var tí, at saltfiskurin skuldi náa fram áðrenn páskirnar, sigur hann.

Kósavirkið hevur tikið ímóti umleið 3000 tonsum av fiski í ár, og málið er at koma upp á 10.000 tons. Ì fjør tók virkið ímóti 9.000 tonsum, og tá vóru umleið 180 ársverk á virkinum.

# Skulu gera Norðurlond burðardygg

**Føroyskir politikarar eru í hesum døgum í Oslo á ráðstevnu hjá Norðurlandaráðnum. Evnið er, hvussu Norðurlond kunnu gerast eitt burðardygt øki**

NORÐURLOND
*John Johannessen*

Tingfólk og ráðharrar úr øllum Norðurlondum eru í hesum døgum á ráðstevnu í Olso og skifta orð um, hvussu Norðurlond kunnu gerast ein burðardygg eind.

Støði verður tikið í frágreiðingini »Burðardygg menning – ein nýggj leið fyri norðurlond«, sum norðurlendska Ráðharraráðið hevur latið gjørt.

Tað var í november, at tað varð álagt Norðurlendska Ráðharraráðnum at gera eina ætlan fram móti burðardyggum norðurlondum ein og burðardyggum grannaøkjum. Í januar 2001 legði Ráðharraráðið fram frágreiðingina, sum fundurin nú tekur støði í.

Í tíðindaskrivi frá Norðurlandaráðnum verður sagt, at hóast nógv er gjørt á øllum stigum seinastu árini fyri at tryggja burðardygga menning í Norðurlondum, er langur vegur á mál.

Tí heldur Norðurlandaráðið tað vera neyðugt, at øll Norðurlond saman reka ein málrættaðan og avgjørdan politikk á hesum øki og tryggja sær atgongd til bestu amboðini, ið kunnu slóða vegin fyri neyðugum broytingum. Tað má fremjast ein skipað endurnýggjan innan allar vinnubólkar og innan tilfeingisnýtslu, íløgur og tøkniliga menning, heldur Norðurlandaráðið.

Á ráðstevnuni í Oslo luttaka fyri Føroyar Dan Reinert Petersen, tingmaður, Jógvan við Keldu, tingmaður, og landsstýrismenninir Jørgen Niclassen og Høgni Hoydal.

Umframt ráðstevnuna verða eisini fundir í ymisku nevndunum undir Norðurlandaráðnum. Í Norðurnevndini, sum føroysku norðurlandaráðslimirnir sita í, verður nýskipan av Norðurlandaráðnum millum annað viðgjørd.

# ítróttur

Nr. 65 • týsdagur • 3. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Eingin fótbóltur á Skálafjørðinum

NSÍ skuldi havt verið í Vágum, og B68 skuldi havt vitjan av B71. Men báðir dystirnir hjá teimum skálafjarðarliðunum vórðu avlýstir. Stóra bilvanlukkan í Skriðunum fríggjanáttina hevði við sær, at feløgini saman við FSF gjørdu av at útseta dystirnar.

Vit hava skilt, at ætlanin er at fáa dystirnar avgreiddar, áðrenn næsta umfarið verður á skránni komandi vikuskifti.

**jh**

# Nógvir møguleikar í Gundadali



*Magni á Lakjuni taklar Vagn Mortensen. Dysturin millum grannarnar í Gundadali endaði við javnleiki 1–1*

**Men B36 og HB megnaðu bara at skjóta eitt mál í part í fyrsta innanhýsis dystinum í hesum árinum**

Tað er altíð stuttligt, tá grannaliðini í Gundadali takast á vøllinum. Sunnudagurin var einki undantak í so máta. Nógv fólk var bæði í HB skýlinum og B36 skýlinum, og tað hoyrdist nógv til tey. Ikki í senn, sjálvandi, men báðir partar høvdu orsøk til at klappa og vena seg.

Spælið verður vónandi betri seinni á árinum, enn tað var hesa ferð. Spælararnir eru ikki í fullgóðari venjing enn, og tað sást aftur í mistum bóltum, skeivum sendingum og harvið óneyðuga spentum støðum.

Sammett við í fjør vóru fleiri nýggir menn, og fleiri spælarar røktu ódnir, sum teir ikki hava verið nógv at sæð í. T. d. var Egil Zachariassen aftur í B36 álopinum. Meðan Arnbjørn Danielsen var á Toftum, vikarieraði Egil sum aftasti maður.

Hjá HB vóru U-18 landsliðsmenninir Jón Rói Jacobsen og Vagnur Mohr Mortensen í miðverjuni, meðan Allan Mørkøre var í álopinum. Andrew av Fløtum gongur við brotnum beini. Tað ehvur aftur og aftur verið frammi, at hann var við landsliðnum í Luksemburg og Svøríki, men tað var hann av góðum grundum ikki.

### Málini og møguleikar

HB kom á odda ein minutt undan steðginum. Eftir hornaspark í vinstru varð bólturin sendur út frá B36 málinum. Hallur Danielsen, sum var staddur á brotsteigarmarkinum, hálvfluktaði, bólturin brast í tvørtræið og fór í málið, og so vóru tað tey í HB skýlinum, sum fegnaðust.

Tíggju minuttir eftir steðgin javnaði John Petersen. B36 miðvøllurin fangaði bóltin, tá HB var á veg fram, og við fleiri ferðir skjótum eitt tvey samanspæli kom landsliðsmaðurin leysur og sneiddi framvið Bárði Johannesen, áðrenn hann trillaði bóltin í málið, og so vóru tað tey í B36 skýlinum, sum fegnaðust.

Allan Mørkøre hevði ein mega møguleika, tá B36 rangstøðufellan kiksaði. Metmaðurin á landsliðnum fór sjálvur, men Tróndur Vatnhamar bjargaði. Hallur Daniesen var púrar leysur, men fekk ikki mál.

Hjá B36 var fleiri ferðir tætt við. Millum annað raktu teir tvær ferðir tvørtræið. Sum 2. hálvleikur leið hevði einki forgjørt verið, um B36 fekk sigursmálið, men sum so mangan áður, so megnaðu teir ikki at fáa ta úrtøkuna ímóti grannunum, sum HB ofta hevur fingið ímóti sínum grannum. At teir í B36 iðraðu seg um, at dómarin ikki bríkslaði fyri brotssparki, tá aftasti maður hjá HB, Jóhannis Joensen, tók beinini undan Egili Zachariasen var væl skiljandi.

**jh**

<u>HB:</u> Bárður Johannesen — Ransin Djurhuus, Jón Rói Jacobsen, Jóhannis Joensen, Vagnur Mohr Mortensen, Janus M.Joensen — Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen — Allan Mørkøre, Bárður Mortansson

<u>B36:</u> Tróndur Vatnhamar — Herbert í Lon, Arnbjørn Danielsen Andrey Pazek — Jákup á Borg, Klæmint Matras, John Petersen, Jens Kristian Hansen, Heðin á Lakjuni — Egil Zachariasen, Magni á Lakjuni

# TB hoyknaði eftir steðgin

**Gøtumenn vunnu stórsigur, og fyrstu løtuna eftir steðgin runnu teir næstan sum teir vildu ígjøgnum heimaverjuna**

Tvørámenn tóku í fjør liðið úr bólkaspælinum, tá tað restaðu tvey umfør. Eftir fleiri stórtap søgdu seg ikki hava møguleika at manna liðið. Higartil í ár hava teir lagt rygg til tvey stórtap. Vónandi farateir at fóta sær, soleiðis at teir ikki taka liðið úr kappingini á hesum sinni.

Sunnudagin var eingin ivi um, hvat liðið á Sevmýri var úr bestu deildini, og hvat liðið var úr næstbestu deildini. Fyrrapartin av fyrra umfarinum megnaðu heimamenninir at fylgja við, og teir javnaði til 1-1.

Men eftir steðgin var klassamunur. GÍ menninir vóru aftur og aftur í fleirtalsstøðum á TB hálvuni, og tað var týðuligt, at teir á allan hátt vóru betri fyri enn mótstøðumenninir, sum framvegis resta nógv í at vera nóg væl fyri at taka lut í stríðnum um uppflyting til bestu deildina.

Hjá TB var fyrrverandi VB ogRoyn málverjin, Lars Muller, í málinum. Zoran Mancic, sum áður hevur spælt í VB, KÍ og Royn, var á miðvøllinum.

Úrslitið var 7-1. Tá skal leggjast afturat, at á GÍ liðnum restaðu tríggir av teimum, sum mugu metast at vera upplagt evni til besta liðið. Her verður hugsað um Sámal Joensen, Helga L. Petersen og Óla Hansen, sum allir av persónligum orsøkum høvdu givið avboð.

### Omar setti hol á

Ein av teimum, sum fekk møguleikan, tí fleiri høvdu meldað frá, var Omar Pásson, og hann takkaði fyri við at skora fyrsta málið. Við fremra stólpan snittaði hann frísparksinnlegg í kassan.

TB maðurin, sum javnaði til 1-1, var bara 16 árar gamli Rasmus Nolsøe. Hann er sonur Ásmund Nolsøe, sum í sjeyti árunum var ein av trimum góðum Nolsøe beiggjum á TB liðnum, sum tá í tíðini var millum tey bestu í landinum og sum vann fleiri FM heiti.

Bartal Eliasen legði GÍ framum aftur við frísparki úr 25 metrum og undan steðginum økti Petur Sjúrðarberg eftir innkast, sum Bartal Eliasen hevði longt.

Eftir steðgin gekk heilt skjótt. Merkisvert var tað, at allirmálskjúttarnir: Áslakur R.Petersen, Petur Sjúrðarberg, Áslakur R. Petersen og Hans Pauli Petersen hoyra til tað ættarliðið av GÍ spælarum, sum er komið til, eftir at flestu av fýra faldu FM vinnararnir eru givnir í fremstu røð.

**jh**

<u>TB:</u> Lars Muller — Tórður Mortensen, Mihai, Ragnar Nolsøe — Bárður Dimon, Jón Tórður Holm, Zoran Mancic, Einar Petersen, Vagnur Nolsøe — Dan Mortensen, Rasmus Nolsøe

<u>GÍ:</u> Hallur Hansen — Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen — Hans Pauli Petersen, Áslakur R. Petersen, Magni Jarnskor, Pól Henning Jacobsen, Omar Pálsson — Petur Sjúrðarberg, Marek

gult cyan magenta svart